

## Stríð um vápnahandil

Í Kina eru myndugleikarnir í øðini um, at USA hevur játtað at selja Taiwan nútímans vápn so sum rakettir og tyrlur. Stjórnin í Beijing hevur gjørt greitt, at handilin fær avleiðingar fyri viðurskiftini millum tey bæði londini. Hvørki Kina ella USA viðurkenna Taiwan sum sjálvstøðugt ríki, og Kina sigur, at amerikanska avgerðin at selja Taiwan vápn er at bera brenni á bálið, sum tikið verður til. Uttanríkisráðið í Washingon sigur harafturímóti, at handilin fer at bøta um ta hernaðarligu javnvágina í økinum.

## Stór heilsukanning

Í næstum fáa 230.000 danir eitt spurnarblað við 52 spurningum um teirra livivanar og heilsustøðu. Eitt nú skulu fólk greiða frá sínum matvanum, rúsdrekkanýtslu og roykingt. Harumframt skulu tey siga, um tey líða av strongd, um tey hava trupulleikar við vektini, hvussu ofta tey eru hjá lækna, og hvussu teirra familjuviðurskifti eru. Kanningin er tann fyrsta av sínum slagi, og teir donsku heilsumyndugleikarnir ætla at brúka úrslitið sum grundarlag fyri avgerðum um fyribyrgjandi tiltøk, og hvørjar varandi sjúkur heilsuverkið skal brynja seg til, skrivar DR.

# Edmund Joensen umboðar Fólkatingið í Norðurlandaráðnum

**Sum fólkatingsmaður er Edmund Joensen limur í tingbólkinum hjá Visntra, sum nú hevur valt hann til fastan lim í Norðurlandaráðnum**

POLITIKKUR
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Eftir reglunum hjá Norðurlandaráðnum eiga Føroyar tveir fastar limir í ráðnum, og hetta valskeiðið hevur Løgtingið valt Katrin Dahl Jacobsen úr Javnaðarflokkinum og Jenis av Rana úr Miðflokkinum sum fastar limir. Eykalimir teirra eru Andreas Petersen og Karsten Hansen.

Føroyskir og grønlendskir fólkatingslimir hava ofta verið eykalimir hjá donskum norðurlandaráðslimum, og í løtuni eru Høgni Hoydal og Sofia Rossen varalimir.

Men nú sita tríggir føroyingar sum fastir limir í Norðurlandaráðnum. Danski flokkurin Vinstri hevur gjørt av, at Edmund Joensen skal hava ein av teimum fýra sessunum í ráðnum, sum flokkurin hevur rætt til. Edmund Joensen ásannar, at støðan er eitt sindur óvanlig, men hann dugir ikki at síggja nakran trupulleika í, at hann sum føroyskur fólkatingsmaður umboðar Fólkatingið í Norðurlandaráðnum.

Tað er ikki altíð, at Føroyar og Danmark draga eina línu í norðurlendskum høpi, men tað heldur Edmund Joensen ikki vera nakran trupulleika:

– Skuldi tann støða íkomið, so kann eg lata mín varamann úr Vinstra taka sæti fyri meg, sigur hann.

### Fund við Løkke

Í síðstu viku var Edmund Joensen á fundi við Lars Løkke Rasmussen, forsætisráðharra. Tað var forsætisráðharrin, sum hevði boðsent føroyska fólkatingsmanninum. Ørindi hansara vóru at tryggja sær stuðul frá sambandsmanninum, sum nú er 90. og tann avgerandi atkvøðan hjá stjórnini, eftir at Christian H. Hansen hevur tikið seg úr Danska Fólkaflokkinum.



*Lars Løkke Rasmussen og Edmund Joensen umrøddu ta nýggju støðuna í Fólkatinginum, nú føroyski tinglimurin er avgerandi atkvøðan*

Edmund Joensen sigur, at hann og forsætisráðharrin umrøddu ta nýggju parlamentarisku støðuna, men hann vil ikki útgreina, hvørji mál teir tosaðu um.

– Eg var í somu støðu, tá Anders Fogh Rasmussen skipaði hesa stjórnina. Vit hava eitt forstáilsi fyri, hvussu samstarv okkara er undir hesum umstøðum, sigur Edmund Joensen. Hann sigur, at hann hevur havt gott samstarv við Lars Løkke Rasmussen, og at hendan støðan er varðveitt og kanska betrað eftir fundin.



# Helgi spyr um tannlæknatrot

**Á tingfundinum mikudagin fer Helgi Abrahamsen, løgtingsmaður, at seta Aksel Johannesen, landsstýrismanni, ein fyrispurning um tannlæknatrotið í Føroyum**

POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

- Metir landsstýrismaðurin, at talið av tannlæknum í Føroyum er nóg høgt, fyri at nøkta tørvin á tannrøktini, og um ikki, hevur politiski myndugleikin so tikið nøkur stig, fyri at nøkta tørvin? Hetta er ein av spurningunum, sum Helgi Abrahamsen, løgtingsmaður, fer at seta Aksel Johannesen, landsstýrismanni, sum skal svara á tingfundinum mikudagin.

Helgi Abrahamsen vísir á, at í fleiri ár hava nógvir føroyingar havt trupult við at sleppa framat til tannlæknaviðgerð. Vanliga verður sagt, at vit eiga at hava ein tannlækna fyri hvørjar 1000 íbúgvar, um viðgerðartørvurin skal nøktast, men longu fyri fimm árum síðani var talið av tannlæknum í Føroyum komið niður á 40, og av teimum var helmingurin oman fyri 55 ár. Sagt var tá, at bert fimm føroyingar lósu til tannlækna, og at trupult var hjá teimum, sum ikki vóru í sjúklingaskipanini, at fáa nakra viðgerð, sigur Helgi Abrahamsen.

Hann vísir á, at Tannlæknafelagið gjørdi eitt átak, har roynt var at fáa ungar føroyingar at lesa til tannlækna, og táverandi landsstýrismaður í heilsumálum segði, í sambandi við ein fyrispurning í løgtinginum í apríl 2005, at hann fylgdi við á hesum økinum, og um átakið ikki broytti støðuna, so mátti politiski myndugleikin, saman við Føroya Tannlæknafelag seta onnur tiltøk í verk.

Nú fimm ár eru liðin, og tannlæknatrotið framvegis er ein trupulleiki, setir Helgi Abarahamsen, landsstýrismanninum.